


# Bananir, appilsinir og fíggjarmálaráðharrin



Val X
BJARNI DJURHOLM
landsstýrismaður

Varð fíggjarlógin fyri 2008 samtykt soleiðis, sum fíggjarmálaráðharrin hevði ætlað, so var rakstrarvøksturin frá 2007 til 2008 heilar 355 mio kr ella 9,5%. Upp á eitt ár!

Hetta er søguligur rakstrarvøkstur. Samstundis er skurðurin í íløgunum 67 mio kr (netto).

Men fíggjarmálaráðharrin ræðist sítt egna barn. Tí ræður um at burturforklára. Blanda tølini, so eingin skilir samanhangin. At vevja samtyktu og ætlaðu eykajáttanirnar fyri 2007 uppí. Men tað er brot á allar fíggjarlógaruppgerðir síðani samanberingar byrjaðu. Sum at samanbera súreplir, bananir og appilsinir.

Tí var neyðugt at fáa val útskrivað, áðrenn løgtingið avdúkaði standin og dumpaði sveinastykkið. Og tað eydnaðist - fyribils.

Tølini omanfyri eru úr fíggjarlógini 2007 og uppskotinum fyri 2008.

**Søguligur rakstrarvøkstur uppá 355 mio kr í eitt ár:**

| | Rakstur framlagt sept. | Rakstur endalig lóg | Íløgur framlagt sept. (netto) | Íløgur endalig lóg (netto) |
|---|---|---|---|---|
| **Bárður Nielsen 2007** (mio kr) | 3,693,189 | 3,736,381 | 261,300 | 260,500 |
| **M. Laksáfoss 2008** (mio kr) | 4,031,486 | 4,031,486 ** val útskrivað | 194,000 | 194,000** val útskrivað |
| **Meirnýtsla í 2008** (mio kr) | **338,297** | **295,105** + eyka 60 mio * **355,105** | - 67,300 | - 66,500 |

**) Vóru á veg í tingið í farnu viku*

# Løgmaður avdúkaði seg sjálvan í gjárkvøldið



Val X
HEIDI PETERSEN
Tjóðveldi

Føroya Løgmaður hevur alla vikuna ført fram at vit skuldu leingja samgongutíðarskeiðið við 14 døgum við teirri grundgeving, at øll vóru samd um at stytta valstríðið.

Víst hevur verið til at tá uppskotið kom fram tíðliga í heyst, var ongin ósemja um at rættast var at stytta um tíðarskeiðið frá val var útskrivað og til tað skuldi haldast, niður úr 6 vikum í 3 til 4 vikur.

Løgmaður hevur púrasta avvíst at orsøkin skuldi vera at samgongan hevði so nógv arbeiði liggjandi á láni, týðandi mál hon hevði lova veljarum sínum at gjøgnumføra hetta valskeiðið, men sum hon ikki hevði klára at gjøgnumføra, og tí nú í seinastu løtu, uttan fyrilit fyri fíggjarligu avleiðingunum, uttanum alla siðvenju um góða og ábyrgdarfulla fyrisiting, har øll lógaruppskot skuldu til løgfrøðiliga eftirkanning í innlendismálaráðnum áðrenn tey kunnu leggjast fyri tingið, bara við hesum 14 eyka døgunum vildi vinna sær stundir at kunna trumfa ófyrireikað og ábyrgdarleys uppskot ígjøgnum løgtingið.

Løgmaður valdi at skriva út nývál áðrenn tingið slapp at taka støðu til broytingaruppskotið frá Sambandsflokkinum, um at útseta ígildiskomuna til 1. januar 2009, altso til ikki at hava virkna til hetta løgtingsvalið.

Her vildi løgmaður ikki lata tingið tala og er hetta besta prógv um at hansara mál púra kalt og kyniskt var at vinna samgonguni tíð, líkamikið við demokratiskari siðvenju, líkamikið við tí fíggjarligu ábyrgdini av samfelagnum, hetta snúði seg einans um at "keypa" sær sjálvum eyka tíð at gjøgnumføra givin vallyfti.

# Tjóðveldis geykaungi í sambandsreiðrinum II

BRYNJÁLVUR DANBJØRG
Porkeri

Træið skal kennast av fruktum tess. Hettar skrivaði eg, tá nýggjur fíggjarmálaráðharri var valdur. Og tjóðveldismenn vóru ovurfegnir, um alt hann segði og førdi fram.

Hettar gav eisini frukt sum formaður tjóðveldis ynskti.

Við hjálp frá fíggjarmálaráðharranum, og formanni Sambandsins eydnaðist at fáa slitið samgonguna.

Nú er so slóðað fyri "Makkaronni samgonguni" millum samband og tjóðveldi.

Tá verður satt svans í politikkinum. Tí Høgni vindur hinar í samgonguni um sín lítlafingur. Ta ber núverandi støða prógv um.

Postverk Føroya, fullveldisbarnið, hevur ikki lært at ganga enn. Onkur helt fyri, at tey, ið har sita tykjast at hava "Kálhøvd", tí tey hugsa ikki normalt.

Ta er nú útlit fyri einum grønum fruktagóðum fullveldi millum Kaj Leo og Høgna. Makkaronni og kálhøvd. Ta er kosturin "Fullveldi" kemur at bjóða føroyingum.

Gabelstíðin verður umtalað sum ein døpur tíð. Christoffer von Gabel og sonurin vóru skilamenn, men tað vóru teir føroysku embætismenninir, sum vóru ódugnakroppar. Og sama skil tykist vera nú á døgum, so søgan endurtekur seg, eisini innan fullveldisposthúsið.

So tað eru ikki bjartar vónir um vit fáa eitt "Makkaronni Fullveldi".

Hugsið um hettar nú løgtingsval stendur fyri durum. Umráðandi er ikki at seta X fyri "Makkaronni Samgonguni".

Hugsið tykkum Høgna sum forseta, og Edmund sum páva í Føroyum, við Kaj Leo og Laksafoss sum tiltaksmonnum. Hettar eru núverandi útlit, hjá føroyingum, um teir ikki taka annað skinn um bak.

Eidesgaard fekk sín dreingjadreym uppfyltan, at vera løgmaður, men vaks ikki nokk við uppgávuni, sum hann annars kundi ført á mál, misti tolið til seinast, væl skiljandi, at so var. Men ein erfarin skipari hevði ikki latið seg provokerað av 2. ella 3. stýrimanni. Sum bleiv villleiddur av einum vrakaðum formanni og andstøðuni. Kanska við gyltum lyftum um samstarv eftir valið. Livst so spyrst. Hugsið tykkum eina samgongu, hvar ryggurin er sum kókað makkaronni. (Sitat frá seinasta Løgtingsfundi K.M.)

# Tryggingarfelagið Føroyar (TF) hækkar bátatrygging við 80 prosentum

FINNLEIF GUTTESEN
Tvøroyri



Ikki eiti á jólagáva ein fær frá TF, nú skriv kom um, at skrokktryggingin á tíggjumannafarinum hækkar við 80 prosentum.

Eftir fyrspurningi fái eg at vita, at hækkingin er so ógvuslig, tí skaðar og tryggingargjald ganga líka upp, so verandi gjald er eingin forrætning hjá TF. "Take it or leave us".

Handan forrætningsmoralin kann TF sjálvsagt hava, men so má tað væl eisini ganga mótsetta veg við gjaldinum, tá ið bátar, hús,bilar o.a. IKKI hava haft skaðar, ella er tað bert ein, einvegis gongd hjá TF, uppeftir?

Samstundis hækkar sjálvsábyrgdin á skrokki frá 1000 krónum upp í 2500 krónur, fyri snellur hækkar sjálvsábyrgdin frá 0 krónur upp í 2000 krónum. Nýtt er eisini, at aldursfrádráttur verður gjørdur fyri skaða á radio og nautisk tól og endurgjald verður ikki givið fyri grindaskaða, hetta er ónatúrliga stórar broytingar uppá ein gongd. Er TF við at fara á húsagongd, hava tey soviá í tímanum ella er tað bert vánalig stýring?

Hvør eigur Tryggingarfelagið Føroyar?

Tryggingargjaldið og bert gjaldið frá tryggingartakaranum, hevur gjørt tað møguligt hjá TF, at vinna sær pening í t. d. fíggjarheiminum. Skal tryggingartakarin ikki eisini hava ágóðan av hesum vinningi? Ognarfelagið Tryggingartakaranna eigur TF, so sjálvsagt skal tryggingartakarin hava ágóðan av fíggjarvirkseminum hjá felagnum.

Hvar er eftirlitið?
Hvar er kappingarráðiå?
Hvar er umboðsráðið?
fg800@post.olivant.fo

# Góð íløga

ZAKARIAS WANG



Høvuðsargumentið fyri at fáa tunlar gjørdar til Sandoynna og Suðuroynna er tað økonomiska.

Vit hava skyldu til at fara væl um tøka fæ okkara og ikki oyðsla tað burtur.

Tað er tað vit gera við núverandi ferjusambandinum.

Við at gera íløgu í eitt nútíðarbært samferðslukervi fáa vit bíligari rakstur og kunna fáa meir burtur úr framleiðslufaktorunum í øllum landinum.

Tað er við at fáa framleiðsluna at geva nakað av sær, at vit fáa tað avlopið, sum ger okkum før fyri at hava eitt væl virkandi skúla- og sjúkrahúsverk.